

# Samkomublaðið fyri aug/sept.

# 2016



KELDAN

Okkara visión er, at Keldan skal vera ein andaligur miðdepil fyri allar Føroyar







www.keldan.fo

Samkomuleiðarapar: Pauli & Jastrid Høj. Tlf. 232511 & 232510



## Tryggleikin í at hava sett mítt álit á Jesus Kristus, Guðs son

*Arnleyg Petersen*

Á lívsleið okkara her á fold kunnu vit møta ymiskum avbjóðingum, minni og størri. Vit leggja planir og hava jaligar væntanir fyri okkara lív. Men tíverri kemur mangan okkurt inn á lívsleið okkara, sum ger, at planir og væntanir ikki blíva veruleiki. Vit missa kanska fótafestið og tungt kann vera at reisa seg aftur.

Haldi, at myndin niðanfyri lýsir væl munin ímillum, hvussu vit ímynda og ynskja, at okkara lív verður, og so tað veruliga lívið, sum mangan møtir okkum. Lívið er ikki altíð so einfalt, sum vit vildu ynskt, at tað var. Tað kunnu koma "fjøll", "dalar", "stormur og regn" o.s.fr. á lívsleið okkara.

Men skulu vit upp um eitt fjall, ja, so er at ganga, grulva, klintra ella hvat so skal til fyri at koma uppum. Skalt tú ígjøgnum ein dal, so halt áfram inntil tú ert komin úr dalinum aftur. Er tað stormur og regn, ja so vita vit, at fyrr ella seinni slítur í, og sólin skínur aftur. Gev ikki upp! Einfalt? Nei, so avgjørt ikki.

Havi sjálv staðið framman fyri "fjøllum", "dølum", "stormum og regni", sum vildu køva meg. Mítt lív hevur verið og er farvað við alskyns litum, og summar tíðir/dagar/løtur eru litirnir heldur dimmir og dominerandi og vilja køva.

Men hvat gera ella velja vit, tá avbjóðingarnar eru við at kvala okkum, og byrðan er tung at bera? Hvar søkja vit hjálp og troyst frá? Fyri meg hevur **mín trúgv á Jesus og mítt álit á Hann, verið mín styrki, troyst og vón. Hann hevur hildið mær uppi og hjálpt mær á føtur aftur. Tann vissan og tryggleikin at vita, at Jesus stendur við sítt orð og síni lyftir, hevur alt at siga fyri meg.**

Tað er ein tryggleiki fyri meg at vita, at óansæð hvat møtir mær á lívsleiðini, so hevur **Jesus lovað at vera við mær og á ongum sinni fara frá mær** (Hebr. 13, 5-6).
Hann er mín styrki og vón, og tað kann Hann eisini blíva fyri teg.

Hjá einum, sum ikki kennir Jesus sum sín frelsara og ikki kennir Hansara kærleika og trúfesti, kann hetta vera ringt at skilja. Og hjá mær at greiða frá, hvussu eg havi merkt og merki Jesu umsorgan og kærleika, er ringt at forklára, tí **Jesus má erfarast. Hann er veruleiki.** Tá eg hyggi eftir mínum lívi, so síggi eg, hvussu trúfastur Hann hevur verið, framvegis er, og eg veit, at Hann fer at verða trúfastur.

Lat ikki "fjøllini" ella avbjóðingarnar køva teg! Um TÚ følir, at lívið er tungt, og tað er trupult at hyggja frameftir,
og tú kanska følir teg skralltóman í tíni sál, so vil eg viðmæla tær at biðja Jesus hjálpa tær. Bjóða Jesus inn í títt hjarta! Bið hann hjálpa, styrkja og vegleiða teg gjøgnum avbjóðingarnar!

At enda vil eg vísa tær á nøkur skriftstøð, sum hava verið mær til stóra hjálp:

"Aftanfrá og frammanfrá heldur Tú tvørtur um meg, og Tú leggur hond Tína á meg" (Sálm. 139,5)

"Eg orki alt í Honum, sum ger meg sterkan" (Fil.4,13)
"Sum dagur tín er, skal styrki tín vera" (5. Mós. 33,25)

"Óttast ikki, tí at Eg eri við tær, lat ikki hugin bila tær, tí at Eg eri tín Guð,
Eg styrki teg við høgru hond rættlætis Míns, Eg hjálpi tær og styðji teg"
(Jes. 41,10)

Les eisini:
Sálm. 34, 7-8 og 55,23
Fil. 4, 6-7.


## Gáva til samkomuna og samkomuvirksemið

Tíggjund/gáva til Kelduna kann flytast á kontu: 9181-1205066 og 6460-1568592
Gáva til missión kann flytast á kontu: 9181-1231369 og 6460-1568606
Gáva til útbygging kann flytast á kontu: 9181-7074346 og 6460-1568584

# Skrá fyri aug/sept.

| | | |
|---|---|---|
| Mánadagur | 15. aug. kl. 20.00: | Bønarmøti |
| Týsdagur | 16. aug. kl. 10.00: | Bønardagur |
| Mikudagur | 17. aug. kl. 17-20: | Kaféterian er stongd |
| Leygardagur | 20. aug. kl. 20.00 : | AWAKE-bønarmøti |
| Sunnudagur | 21. aug. kl. 11.00: | Felags morgunmøti (Keldan og Oasan)<br>Innsavnan til Bíbliufelagið<br>Suppa til keyps eftir møtið. 30 kr. fyri vaksin (0-5 ár ókeypis). Tilmelding hjá Margit á tlf. 284322 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| Mánadagur | 22. aug. | kl. 20.00: | Bønarmøti |
| Týsdagur | 23. aug. | kl. 10.00: | Bønardagur |
| Mikudagur | 24. aug. | kl. 17-20: | Kaféterian er opin |
| Hósdagur | 25. aug. | kl 10.30-13.00: | Mammukafé |
| Leygardagur | 27. aug. | kl. 20.00: | AWAKE við Karstin Justesen |
| Sunnudagur | 28. aug. | kl. 11.00: | Morgunmøti við Ólavi Jacobsen |
| | | kl. 20.00: | Á sanganna veingjum |

| | | | |
|---|---|---|---|
| Mánadagur | 29. aug. | kl. 20.00: | Bønarmøti |
| Týsdagur | 30. aug. | kl. 10.00: | Bønardagur |
| Mikudagur | 31. aug. | kl. 17-20: | Kaféterian er opin |
| Leygardagur | 3. sept. | kl. 20.00: | AWAKE við Ingibjørn Royðutoft |
| Sunnudagur | 4. sept. | kl. 11.00: | Morgunmøti við Rúna Rasmussen<br>Innsavnan av tíggjund og heiløgum gávum |

| | | | |
|---|---|---|---|
| Mánadagur | 5. sept. | kl. 20.00: | Bønarmøti |
| Týsdagur | 6. sept. | kl. 10.00: | Bønardagur |
| Hósdagur | 8. sept. | kl. 10.30-13.00: | Mammukafé |
| Leygardagur | 10. sept. | kl. 20.00: | Frá hjarta til hjarta (lovsangsløta) |
| Sunnudagur | 11. sept. | kl. 11.00: | Morgunmøti við vitjan úr DK (Salt and Light) |

| | | | |
|---|---|---|---|
| Mánadagur | 12. sept. | kl. 20.00: | Bønarmøti |
| Týsdagur | 13. sept. | kl. 10.00: | Bønardagur |
| Leygardagur | 17. sept. | kl. 20.00: | AWAKE við Anju og Øyvind Bjerknes (dreingja- og gentumøti) |
| Sunnudagur | 18. sept. | kl. 11.00: | Morgunmøti við Paula Høj |